# TANN HEITA PRINSESSAN



23 ára gamla prinsessa Madeleine er tað heita navnið í svenska kongshúsinum. Tá ið tey kongaligu eru úti til almenn ella privat tiltøk er tað altíð tann unga prinsessan, sum stjelur myndina. Hon verður avmyndað úr høvd í r... og áhugin fyri at skriva um hana í bløðum er sera stórur – ikki bara í Svøríki, men eisini í hinum norðurlondunum og í til dømis Týsklandi.

Um vikuskiftið var svenska kongafamiljan til brúdleyp hjá Carl Silferschøld og Mariu Frederiksson, og aftur hesaferð var tað Madeleine, sum myndamenninir vóru ídnaðist at avmynda.

Stóri áhugin fyri prinsessuni ger, at trygdarfólk fylgja henni allastaðni, har hon ferð. Svenska trygdarløgreglan Sæpo ansar eftir Madeline, og tá ið hon skal í veitslur ella út millum fólk, fylgja vanliga fýra mans prinsessuni.

Og tað kann stundum virka nakað komiskt, tí tá ið Medeleine herfyri var úti við sjeikinum sat ein trygdarvørðar saman við teimum allatíðina, meðan tríggir aðrir mans sótu við borð nærindis.



*Madeleine við berum ryggi til brúdleyp um vikuskiftið. Svenska prinsessan strálaði í tí góða summarveðrinum*



*Krúnprinsessa Victoria, prins Carl Philip og prinsessa Madeline komu saman til brúdleypið hjá Carl Silfverschold og Mariu Fredriksson*

## Holmes cruisar við Tom

Sjónleikarparið Tom Cruise og Katie Holmes eru mest umtalaða parið í Hollywood í hesum døgum. 42 ára gamli Tom Cruise hevur funngið saman við tí 26 ára gomlu Katie Holmes, og tey hava úr at gera við at vísa seg alment. Nú um dagarnar vóru tey í Paris, har Tom Cruise gjørdi pr-arbeiði í sambandi við filmin War of the Worlds. Og í hølunum á honum var sjálvandi Katie Holmes, og tey høvdu einki ímóti at vísa almenninginum, at tey eru góð. Sum prikkurin yvir i'ið fríggjaði Tom Cruise til Katie Holmes í Eifeltorninum. (Mynd: Scanpix)





## Mótmæla berum boppum

Tríggir týskir ferðamenn mótmæltu í farnu viku, at kvinnur ganga toppleysar á strondunum í Antalya í Turkalandi. Herman Oppbscher, Heibert Kocourek og Ahmet Senyuz høvdu latið seg í bikini, og teir gingu síðani runt á strondini og heittu á konufólk um at lata seg betur í og ikki ganga við berum boppum. Teir tríggir týskararnir halda, at toppleysar kvinnur oyðileggja moralin hjá ungfólk.
(Mynd: Scanpix)



## Backstreet royna aftur

Fýra ár aftan á at amerikanski dreingjabólkurin Backstreet Boys kastaði handklæðið í ringin, royna teir seg nú aftur við nýggjari útgávu. Dreingirnir, sum eru vorðnir menn, hava givið nýggja fløgu út, ið kallast »Never Gone«. Tað er svenski snilliinignurin Max Martin, ið hevur produserað og co-skrivað. Martin var eisini maðurin aftan fyri fleiri av teirra størstu hittum á eitt nú fløguni "Millennium", sum kom út í 1999 og seldi 13 milliónir eintøk. Hóast Backstreet Boys tilsamans hava selt 35 milliónir fløgur, so siga teir seg onki hava ímóti at vera underdogs, nú hip-hop hevur tikið føringina frá dreingjapoppinum. Teirra fyrsta single-lag »Incomplete« rakk einum 6. plássi á amerikanska Billboard hitlistanum, men er smokkað niðureftir síðani.
(Mynd: Scanpix)

